# Kinverjar meirvirka nógvan makrel til Japan

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Kina er farið at gera rættiliga nógv burtur úr at virka makrel til flak.

Noreg er eitt av londunum, sum selir kinverjum makrel, men landið selir eisini nógvan makrel til Japan.

Fyri sløkum 5 árum síðan komu tey fyrstu kinversku makrelfløkini á japanska marknaðin, og nú fer meginparturin av makrelinum, sum norðmenn selja Kina, um kinverskar verksmiðjur til Japan.

Fyrra hálvár í ár hendi so tað, at norski útflutningurin til Kina gjørdist størri enn beinleiðis útflutningurin av makreli til Japan. Í fjør var lutfallið 30/70 til fyrimuns fyri norska útflutningin til Japan.

## Hørð kapping

Í Japan hava framleiðarar og innflytarar tað stríggið í hesum tíðum.

Teir eru »fangaðir« av høgum rávøruprísum og øktum trýsti frá stóru matvøruketunum. Tí venda japanskir innflytarar sær nú í størri og størri mun til Kina og vilja hava kinverjar at framleiða makrelfløk fyri seg. Hetta síggja teir sum ein kærkoman møguleika, nú trýstið er so stórt frá fleiri síðum.

Prísvøksturin av makreli til Japan hevur ikki bara ført til, at góðskingin av makreli verður »flaggað út« til Kina. Men torføru tíðirnar í Japan føra eisini við sær, at marknaðurin fyri síl noyðist at kappast við makrelin og lodnuna.

# Triði hvør toskur fer uttanum knívin

**Seinasta árið hava norðmenn meira enn tvífaldað sín útflutning av feskum fløkum**

ÓVIRKAÐUR FISKUR
*Vilmund Jacobsen*

33% av toskinum, sum Noreg útflutti fyrra hálvár í ár, fór óvirkaður av landinum. Hetta er ein vøkstur uppá heili 12% samanborið við fyrra hálvár í fjør.

Tað er serliga saltfiskaframleiðslan í Noregi, sum í ár hevur upplivað »turk« á marknaðinum orsaka sterkum gjaldoyra og høgum rentustigi.

Í tonsum minkaði útflutningurin av saltfiski við meira enn 20% fyrra hálvár í ár, og hetta kostaði norskum útflytarum út við 250 milj. norskar krónur.

Hetta merkir, at støðan hjá norskum saltfiskaframleiðarum er viknað nógv seinasta árið.

Norsk bløð skriva, at ein týdningarmikil orsøk til negativu gongdina innan saltfiskaútflutningin er kreppustøðan hjá Vannafyritøkuni. Henda fyritøkan er so mikið stór, at tá ið tað gongst henni ímóti, sæst tað aftur í hagtølunum yvir samlaða saltfiskaútflutningin.



*Komandi ár ætlar norski fiskimálaráðharrin, Svein Ludvigsen, at toskafiskiskapurin skal fevna um longri tíðarskeið. Her vitja hann og føroyski starvsbróðurin, Jørgen Niclasen, á Hellunum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Útflyta fesk fløk

Hjá flakaframleiðarunum í Noregi gekst betur fyrra hálvár í ár; her vaks útflutningurin við 145 milj. krónum, hóast nøgdin minkaði 8%.

Í Noregi siga tey, at flakavinnan hevur megnað at varðveitt sín marknaðarpart hóast sterka gjaldoyrað. Ein orsøkin er, at alt meira verður útflutt at feskum fløkum, sum norðmenn vænta fer at vinda uppá seg hjá flakaframleiðarunum. Seinasta árið er útflutningurin av feskum fløkum meira enn tvífaldaður. Hetta kemst av, at framleiðarar í Finnmørkini í størri mun enn aðrir hava sent fesk fløk á evropeiska marknaðin.

Hóast ljóspunktini hjá flakavinnuni, er samlaða myndin hjá norskum útflytarum einki at rópa hurrá fyri. Í nøgd minkaði útflutningurin av toski við næstan 18% fyrra hálvár í ár. Hetta er nógv, tá ið havt verður í huga, at hetta er besta tíðin hjá norsku fiskivinnuni. Í fyrra hálvári eru toskakvoturnar nevniliga nógv størri enn seinna hálvár.

Norðmenn hava tó hampiliga góðar vónir fyri komandi ár, tí fiskimálaráðharrin, Svein Ludviggsen, hevur sagt seg vera sinnaðan at leingja um toskafiskiskapin.

# Føroyar fyrireika fund um hvalaveiði

HVALAFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*

Norsk bløð vita at siga, at Føroyar nú fyrireika seg til ársfund í altjóða felagsskapinum fyri hvalaveiðimenn, World Council of Whalers, sum verður í Føroyum í døgunum, 26.-29. september.

Á hesum fundi hittast hvalaveiðimenn úr øllum heiminum at røða um veiði og framtíðar »stategi« í stríðnum at varðveita hvalaveiðina, sum bæði hevur mentanarligan týdning og týdning sum føði.

Fyrireikingarnar »pågår for fullt«, sum sagt verður. Greinskrivarin veit at siga, at nakrir hvalir herfyri doyðu í Klaksvík. Av hesum eru tríggir hvalir tiknir úr grindini og eru frystir. Teir skulu brúkast á ársfundinum, soleiðis at fólk kunnu síggja, hvussu grindahvalur verður skorin upp.

Lagt verður aftrat, at bretskar og amerikanskar sjónvarpsstøðir eru bodnar at verða við, soleiðis at tær kunnu avmynda tað, ið fer fram.

# Eitrandi bláskel

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*

Stavanger Aftenblad skrivar, at tey, sum síggja eina leskiliga bláskel á eini matstovu, skulu lata vera við at eta hana, tí skelin er fongd við eituri, sum førir til bleytan maga.

Royndir, sum matvørueftirlitið í Mið-Rogalandi í Noregi hevur tikið, vísa, at bláskelin á hesum leiðum er fongd við ov stórum nøgdum av alguni, dinophysis acuta. Hendan algan kann hava evnir í sær, sum elva til bleytan maga. Etir tú skelina, tá ið hon er fongd við hesum eituri, kanst tú rokna við, at »botnurin« rýkur undan tær!

## 80 sløg eitrandi

Skeljar liva av at sýla ymiskar partiklar, sum síðan verða sodnaðir. Týdningarmikil føði fyri skeljar er mikroskopiskar einkyknaðar planktonalgur. Av umleið 4000 kendum plantuplankton í havinum, eru umleið 80 sløg eitrandi.

Stavanger Aftenblad skrivar, at framvið norsku strondini eru umleið 20 ymisk sløg av eitrandi plantuplankton.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæra mamma, omma og langomma okkara

**Palma Jensen**
**Tvøroyri**

doyði og varð jarðað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Eirik, Jákup, Haldis, Nina og Maj Britt**

## Tøkk

Vit ynskja á henda hátt so hjartaliga at takka øllum tykkum mongu, sum sýndu samkenslu, tá ið okkara høgt elskaða kona, mamma, omma og vermóðir

**Snæbjørg Ørvarodd**

doyði og varð jarðað.
Tøkk øll tit mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Tøkk til tykkum á B7, prestin Hera Joensen, gravarar, berarar, sangarar og øll onnur, sum komu inn á gólvið, ringdu, skrivaðu, sendu blómur, kransar og minningargávur.

*Familjunnar vegna*
**Dalfinnur**



# Jóna í fokus í Focus



*Framsýningin hjá Jónu Rasmussen letur upp í Galleri Focus í morgin. Framsýningin er opin til 21. september*

**Jóna Rasmussen sýnir fram í Galleri Focus næstu tvær vikurnar**

LIST
*Eirikur Lindenskov*

Í morgin, fríggjadagin 6. september kl. 16, letur Jóna Rasmussen upp framsýning í Galerie Focus í Havn.

Jóna Rasmussen er grafikari og listamálari og hevur síðan 1991 sýnt fram í Føroyum, Danmark og aðrastaðni.

Fyrstu serframsýningina hevði hon í Listaskálanum í 1999. Íblásturin til myndirnar fær hon millum annað úr náttúruni, frá sjómanslívinum, frá tónleiki, elementið er ofta vatn, og hon ger eisini abstraktar myndir.

Tann svart/hvíti grafikkurin stendur sterkur, men eisini grafikkur og málningar í litum, ofta í bláum og turkis, standa sterkir við hennara sermerktu strokum.

Framsýningin hjá Jónu Rasmussen í Galerie Focus í Gríms Kambans Gøtu 20 í Havn verður frá 6. til 21. september, og opið er týsdag til fríggjadag kl. 14 til 18, leygardag kl. 16 til 18.

Fernisering verður fríggjadagin 6. september kl. 16 til 18.

# Børn úr Hvítarusslandi dansa

VITJAN
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Børn úr Hvítarusslandi vitja í hesum døgum børn í Føroyum. Tey komu til landið mánadagin við Norrønu. Í gjár og í dag ferðast tey runt í Suðuroynni. Føroysku vertirnir eru Erling Jørgensen og Edmynd Nysted.

Vit hava havt vitjan av børnum úr Hvítarusslandi fyrr.

– Helvtin av børnunum, sum eru við hesaferð, vóru eisini við seinast fyri tveimum árum síðan og fyri tey er hetta kanska serliga spennandi, tí nú fáa tey høvi at hitta vinir aftur, sum tey lærdu at kenna seinast tey vóru í Føroyum, sigur Erling Jørgensen.

– Børnini vísa fram russiskan dans og tey eru dugnalig, sigur Erling, sum sjálvur er íðin dansari.

Børnini vitjað á teimu størru skúlunum í landinum og tey koma víða um. Mánadagin vitjaðu tey í Havn. Tey dansaðu fyri teimum eldru í Tilhaldinum, tey vitjaðu á Venjingarskúlanum, Studentaskúlanum og í Hoyvíkar Skúla.

Týsdagin vóru tey í Eysturoy har tey vitjaðu Mentanarhúsið í Fuglafirði og hittu fryntliga leiðaran, Jonhard Hammer, sum greiddi eitt sindur frá mentanarviðurskiftum har á leið.

Í morgin fara børnini vestur í Vágar, har tey skulu vitja á Ellisheiminum og skúlan á Giljanesi.

Leygardagin og sunnudagin verða tey í Havn. Tey skulu millum annað í kirkju sunnudagin hjá Hera, presti í Vesturkirkjuni.

Mánadagin verður farið til Sandoyar at vitja Meginskúlan. Týsdagin verða børnini aftur í Havn og mikudagin fara tey avstað aftur við Norrønu.





